# Nýtt dansistað letur upp

**Í dag letur upp eitt nýtt dansistað í Havn. Staðið, har dansað verður, er tó ikki heilt ókent fyri dansifólki í Havn, tí talan er um gamla Kvøldlot**

NÁTTARLÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í mong ár var Kvøldlot eitt tað best umtókta dansistaðið í høvuðsstaðnum, og serliga hóskvøld og sunnukvøld var tað staðið at fara í býin í Havn. Hølini hava nú ligið manntóm í fleiri ár, men í kvøld verður latið upp aftur í nýggjum og snotuligum hami.

### Ikki bert dansistað

Tað er Hans Andreasen á Argjum, ið eigur nýggja dansistaðið, ið hevur fingið navnið Glitnir, ið er sprotið úr norrønu gudalæruni.

Hans sigur, at tað ikki bert verður dansivirksemi, ið verður í Glitnir. Ætlanin er eisini at bjóða fram onnur tilboð, so sum lættari ábit, fótbóltsdystir á stórskíggja, upphiting til allar landskappingardystir í Formuladeildini, sum verða spældir í Gundadali, øðrvísi fimmara og so framvegis.



*Tað er Hans Andreasen, ið eigur nýggja dansistaðið Glitnir, ið heldur til í somu hølum, sum kenda dansistaðið Kvøldlot var í gomlum døgum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sagt verður, at tað eru fleiri onnur hugskot um ymiskt virksemi, ið kann verða í Glitnir, men hvørji hesi eru, vil Hans Andreasen ikki siga meiri um, tí tey skulu snikkast til, áðrenn tað verður sett í gongd.

Stílurin inni í Glitnir er rættuliga flottur, og innbúgvið hoyrir avgjørt ikki til í tí bíligara endanum.

Glitnir hevur eina heimasíðu, www.glitnir.org, har tað ber til hjá fólki at fáa vitan um tiltøk, ið liggja fyri framman í nýggja dansistaðnum.

# Portari í nýggjum hami

**Green Islands Stout eitur nýggjasta skotið á ølstammuna hjá Føroya Bjór. Royndarsmakking av nýggja løginum verður á Rex um vikuskiftið**

ØL
*Jákup Mørk*

Tað eru ikki bara írar, sum duga at gera myrkt øl til grønar oyggjar. Tað vilja tey hjá Føroya Bjór í øllum førum ikki lata um seg ganga, og tí eru tey nú komin á marknaðin við eini nýggjari øl.

- Eg skal ikki siga, at talan er um eina spildurnýggja øl, men heldur ein menning av portaranum, sum vit hava havt hampuliga leingi, sigur Heini Waag á Føroya Bjór.

- Vit hildu, at gamli portarin trongdi til at verða peppaður nakað upp, og tað hava vit so roynt at gjørt við hesum. Smakkurin á hesari ølini er ikki heilt so beiskur, sum hann var á portaranum. Fyrstu fløskurnar eru longu tappaðar, men tær hava so etikkturnar hjá gamla portaranum á. Men tað verður so broytt, næstu ferð vit tappa, sigur hann.

### Góður eftirsmakkur

Stout-ølið er annars nakað, sum serliga bretar og írar eru kendir fyri. Ikki minst hevur Guinness seinastu 20 árini vunnið frama kring allan heimin, og sæð burtur frá Føroyum, so er neyvan eitt land í heiminum, har tú ikki kanst fara á eina írska pub at fáa tær smakk av myrka løgnum.

Guinnes er tó langt ífrá einasta stout-ølin, sum verður framleidd, men hon kann helst væl nýtast sum sammetingargrundarlag. Og tað kann alt fyri eitt sigast, at nýggja ølið hjá Føroya Bjór stendur einki aftan fyri kenda írska merkið.

Sjálvandi verður fyllan í skúminum ikki heilt tann sama við vanligari kolsýru, har Guinness eisini nýtir køvievni, men smakkurin er ógvuliga líkur. Ein bleyt øl við einum góðum eftirsmakki, sum í nógvar mátar er heldur sjáldsamur fyri føroyskt øl.



*Ein myrkamorreyður veðrur kundi kanska verit eitt hóskandi eyknevnið til nýggja ølið hjá Føroya Bjór. Fyrstu tíðina mugu kundarnir tó smyrja seg við, at talan verður um nýtt øl við gomlum etikettum*

### Royndarsmakking

Fríggjakvøldið fáa ølsvangir føroyingar so eisini høvi at royndarsmakka nýggja ølið hjá Føroya Bjór. Hetta verður gjørt á Rex í Havn, sum hevur fyrireikað eitt serligt smakki-kvøld.

Tað verður gjørt á tann hátt, at atgongumerkini hetta kvøldið kosta 100 krónur, men at tey vitjandi aftur fyri hetta samstundis hava keypt sær fimm ymiskar øl. Eina Black Sheep, eina Slupp, eina Classic, ein veður og so sjálvandi eisini eina Green Islands Stout. Ella skuldi heitið kanska verið ein myrkamorreyður veðrur.


## GRANSKINGARLEIÐARI

P/F Fiskaaling søkir eftir einum granskingarleiðara, ið skal hava ábyrgdina av at menna eitt granskingarumhvørvi innan aling av fiski og skeljadjórum.

Felagið miðar eftir at ganga á odda í granskingar- og menningarvirksemi innan aling í Føroyum og í samstarvi við aðrar granskingarstovnar í Føroyum og uttanlanda, at byggja upp eitt granskingarumhvørvi á høgum fakligum støði. Talan verður um vinnuliga gransking, ið skal verða við til at menna núverandi og komandi aling, har brúkarin verður settur í miðdepilin.

Vit vænta, at granskingarleiðarin hevur góð evni at geva íblástur til aðrar granskarar og at skapa netverk við umheimin. Granskingarleiðarin skal m.a. raðfesta og fyrireika nýggjar verkætlanir og leiðbeina øðrum granskarnum. Ein týðandi uppgáva verður eisini at miðla vitan og úrslit frá granskingar- og menningarvirkseminum til vinnuna, almenningin og granskarar og annars at veita ráðgeving innan aling

KRØV OG YNSKI TIL UMSØKJARAN:
- Viðkomandi prógv frá hægri lærustovni
- Royndir innan granskingarvirksemi - Ph.D.-prógv er ein fyrimunur
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at samskifta á enskum, bæði í skrift og talu

SETANARVIÐURSKIFTI
Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika fyri at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu og í mun til útbúgving og starvsroyndir. Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá Fiskaaling við Áir. Meiri fæst at vita við at venda sær til Ingolf Joensen, stjóra, tel. 474747.

UMSÓKN
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu, í seinasta lagi 20. juni 2005 kl. 12.00, sendast til:

P/F Fiskaaling
Við Áir
430 Hvalvík

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík, í Skopun og í Hesti. Samlaða starvsfólkatalið er 19. Fiskaaling stendur fyri kynbótaarbeiðið við laksi og sílum, eins og arbeitt verður við at menna kalva og onnur nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Arbeitt verður við at umleggja kynbótaarbeiðið, og felagið ætlar framyvir at leggja størri orku í gransking, sum náttúrliga hoyrir undir virkisøki felagsins. Meiri fæst at vita um felagið á www.fiskaaling.fo.

TEAM85








**CITRÖEN XANTIA ACTIVA 2.0 I TC**
Árg. okt. 1998, 150 HK, gráur, 63.000 km. Útgerð: leðursetur, fløguspælara (6 fløgubox), 18" alufelgur, eykasett 15" vetrardekk á felgum eitt sett originalar 15" felgir. Bilurin er sera væl hildin og í besta standi. Bert ein eigari - ikki roykjari. Til sølu um hóskandi boð fæst. Prísuppskot kr. 120.000.

**Tel. 271790**